# Landsstýrið leitar eftir milliónum

**Einar 200 milliónir krónur skulu sparast á fíggjarlógini fyri næsta ár, um hallið ikki skal verða størri, enn tað er í ár. Harafturat koma møguligar lønarhækkingar á almenna arbeiðsmarknaðinum í heyst**

FÍGGJARLÓGAR-UPPSKOT
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Landsstýrið skal næstu dagarnar finna einar 200 milliónir krónur í almennum sparingum, skal hallið á fíggjarlógini fyri 2006 ikki vaksa samanborið við í ár.

Útvarpið visti mánakvøldið at siga, at tá ið framrokningar av inntøkum og útreiðslum hjá tí almenna eru gjørdar fyri næsta ár, er hallið á fíggjarlógini einar 430 milliónir krónur.

Tí skal landsstýrið spara einar 200 milliónir krónur, um ikki hallið á fíggjarlógini skal vaksa næsta ár.

Bárður á Steig Nielsen, landsstýrismaður, váttaði fyri Útvarpinum, at tølini, sum landsstýrið nú arbeiðir við, eru á leið hesi.




*Landsstýrið arbeiðir nú við fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006. Sparingar skulu fremjast, um hallið ikki skal vaksa næsta ár samanborið við í ár*

### Útreiðslurnar kunnu vaksa meira

Sambært stýrisskipanarlógini skal uppskotið um fíggjarlóg leggjast fyri løgtingið áðrenn 1. oktober, og tí hevur landsstýrið einki langt skóðbrá at arbeiða við. Fíggjarlógaruppskotið skal prentast, áðrenn tað verður lagt fyri tingið, og tí nærkast tíðarfreistin fyri uppskotinum nú av álvara.

Í uppskotinum til fíggjarlóg verður hædd ikki tikin fyri, at lønarútreiðslurnar hjá tí almenna møguliga vaksa í heyst.

Nógvir av sáttmálunum á almenna arbeiðsmarknaðinum ganga út 1. oktober, og tí skulu samráðingar nú gera av, um almennu lønir skulu vaksa, og hvussu nógv tær møguliga skulu vaksa.

Møguligar lønarhækkingar koma tí afturat teimum útreiðslum, sum landsstýrið hevur gjørt upp fyri næsta ár.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá landsstýrismanninum við fíggjarmálum áðrenn evstamark á blaðnum í gjár.

# Landið kann liva við halli

**– Tað er eingin vanlukka við einum stórum halli á fíggjarlógini, um landsstýrið heldur, at fíggjarpolitikkurin í longdini er burðardyggur, sigur Johnny í Grótinum, formaður í Búskaparráðnum. Hann heldur tó, at tað er einki mál at seta sær, at hallið á fíggjarlógini næsta ár skal vera tað sama, sum tað er í ár**

BÚSKAPUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Er niðurstøðan, at pengarnir verða brúktir rætt, so er einki galið við at hava eitt hall á 300 ella 400 millónir krónur á fíggjarlógin næsta ár, tí búskapurin er í einum lágkonjunkturi, sigur Johnny í Grótinum, formaður í Búskaparráðnum*

Tað er eingin orsøk til at rista í brókunum, hóast hallið á fíggjarlógini fyri 2006 møguliga fer at vaksa.

Tað heldur formaðurin í Búskaparráðnum, sum heldur mælir landsstýrinum til at gera upp við seg sjálvt, um búskaparpolitikkurin hjá landinum er burðardyggur í longdini.

– Tað er einki mál at seta sær, at hallið á fíggjarlógini næsta ár skal vera einar 200 milliónir, tí at tað var tað í fjør. Landsstýrið skal heldur ganga ígjøgnum allar útreiðslurnar og gera av, um tað er rætt at brúka pengarnar, soleiðis sum teir verða brúktir.

– Er niðurstøðan, at pengarnir verða brúktir rætt, so er einki galið við at hava eitt hall á 300 ella 400 milliónir krónur á fíggjarlógini næsta ár, tí búskapurin er í einum lágkonjunkturi, sigur Johnny í Grótinum.

### Einki krepputekin

Formaðurin í Búskaparráðnum staðfestir, at hallið nýtist ikki vera alarmerandi fyri føroyska búskapinum.

– Búskapurin hevur verið fyri afturgongd síðani 2001, men vinnulívið er við at tillaga seg. Tað almenna kundi gott lært av tí privata vinnulívinum og tillaga seg broyttu umstøðurnar. Fíggjarstøðan hjá tí almenna er tó sera góð, tí umvegis ta almenna eiga vit aktiv fyri einar 4 milliardir, meðan almenna skuldin er einar 3 milliardir. Tí er undirskotið ikki alarmerandi í løtuni, sigur Johnny í Grótinum.

Hann heldur hinvegin, at tað hongur ikki saman, at landsstýrið ynskir at minkað um hallið, samstundis sum tað letur ein skattalætta fyri einar 60 milliónir krónur um árið.

– Skattalættin er ikki sjálvfíggjandi. Hann minkar um inntøkurnar hjá tí almenna, og tí er eingin samanhangur millum at minkað hallið, samstundis sum man gjarar út við skattalætta. Skal landsstýrið finna sparingar fyri einar 200 milliónir krónur, so kundi tað byrja við at tikið skattalættan burtur, heldur Johnny í Grótinum.

### Spurningur um at satsa

Í seinastu frágreiðingini frá Búskaparráðnum, sum kom nú um dagarnar, verður talað fyri, at tað almenna skal tora at satsa upp á tøkniliga menning fyri at produktiviteturin í samfelagnum skal økjast – og harvið eisini vælferðin.

– Í eini tíð, har tað almenna satsar upp á útbúgvingar ella fremur tøkniliga menning, er einki til hindurs fyri, at eitt stórt hall er á fíggjarlógini, um tað í longdini hevur við sær, at produktiviteturin í samfelagnum økist, sigur Johnny í Grótinum.

– Tí er fyrsta uppgávan hjá landsstýrinum at gera av, um búskaparpolitikkurn er burðardyggur, og fíggjarlógaruppskotið skal ikki sikta eftir einum ávísum halli, tí at soleiðis var tað seinast, sigur formaðurin í Búskaparráðnum.

## Fyrireika uppleggið

**– Tað er kanska ikki so løgið, at landsstýrismaðurin roynir at mála fanan á veggin, nú sáttmálasamráðin garnar standa fyri framman, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í starvsmannafelagnum**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Starvsmannafelagið fyrireikar seg í hesum døgum til samráðingar við tað almenna um nýggjan sáttmála. Nógvir almennir sáttmálar fara úr gildi 1. oktober, og samráðingarnar um nýggjan sáttmála byrja innan stutta tíð.

Seinnapartin týsdagin hevði Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, sent boð eftir formonnunum í fakfeløgunum, sum skulu samráðast við tað almenna komandi tíðina. Har skuldi hann greiða teimum frá støðuni hjá tí almenna undan sáttmálasamráðingunum.

– Tað er kanska ikki so løgið, at landsstýrismaðurin roynir at mála fanan á veggin, nú sáttmálasamráðingarnar standa fyri framman, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í starvsmannafelagnum, og sipar til tíðindini um, at tað almenna skal spara fyri einar 200 milliónir á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006.

### Taka atlit

Boðini frá landsstýrismanninum fara ikki at kollvelta nakað upplegg hjá Starvsmannafelagnum.

– Vit arbeiða nú við okkara útspælið til samráðingarnar, og vit taka tey altit, sum vit halda verða neyðugt. Okkara uppgáva er at tryggja so góðar umstøður sum gjørligt til okkara limir, og samfelagssinnið er altíð ein partur av viðgerðini hjá okkum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hann roknar við, at sáttmálasamráðingarnar fara at byrja fyrsta dagin, men hann tóktist ikki sørt spentur at hoyra, hvat landsstýrismaðurin hevði at siga við fakfeløgini seinnapartin týsdagin.